# Ivasamur um lofttelefoni

**Magni Arge sigur, at tey í Atlantic Airways als ikki hava tikið støðu til, um tey skulu loyva telefonsamrøðum umborð á sínum flogførum**



FLOGFERÐSLA

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í gjár tók ES-nevndin støðu til, at bannið móti at tosa í fartelefon umborð á flogførum, verður tikið av. Fyri at tosa í telefon umborð á flogførum krevst tó, at ein ein sonevnd basa verður sett í flogførini. Og tann tøknin er enn ikki heilt liðug.

- Fyrst og fremst, so er tað eitt rættiliga prinsipielt mál, sum vit als ikki hava tikið støðu til, sigur Magni Arge, stjóri í Atlantic Airways.

- Hartil er tað eisini ein spurningur, hvussu stór íløgan er. Og tað verður neyvan so, at vit fara at seta útgerðina umborð á eldru flogførini í okkara flota. Men um tað verður gjørt við tey nýggjaru flogførini, er so eitt mál, sum vit fara at taka upp, sigur Magni, sum annars sigur seg hava rættiliga ambivalentar kenslur hesum viðvíkjandi.

- Øðru megin er hetta helst eitt rák, sum fer at koma. Og tá verður tað helst trupult at halda aftur, um kundarnir ynskja hesa tænastu. Hinvegin hevur loftrúmið verið eitt av teimum fáu fríplássunum, har tú hevur fingið frið fyri fartelefonini. Og tað ivist eg ikki í, at tað eru nógv, ið seta stóran prís á, sigur Magni Arge.

## Fartelefonina við á flog



**ES-nevndin hevur gjørt úrskurð um, at ferðandi nú kunnu tosa í fartelefon umborð á flogførum**

FLOGFERÐSLA

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Ætlanin er nú, at flogfeløg skulu seta sonevndar basastøðir umborð á flogførini, og verða hesar tendraðar, tá flogfarið kemur upp í 3.000 metra hædd.

Basustøðirnar hava beinleiðis samband til fylgisveinar.

Enn er neyðuga útgerðin ikki góðkend av European Aviation Safety Agency, men sambært danska EPN er hetta bert ein spurningur um tíð.

Enn er tó ikki greitt, hvat kostnaðurin fyri fartelefonnýtslu yvir skýggjunum verður. Enn hevur ES-nevndin ikki ásett nakað hægstamark, men tey heita tó á flogfeløgini, sum koma at umsita hetta, um at vísa hógv, tá prísurin verður ásettur.





**Um tú vilt vera við til at menna og styrkja nýggj virkisøki í einari fyritøku, sum tøkniliga er í fremstu røð, so ert tú helst tann framfýsni kundaráðgevin sum vit nú leita eftir.**

Talan er um eitt rættiliga áhugavert og avbjóðandi starv, har tú umframt at taka tær av dagliga samskiftinum við okkara kundaskara, eisini skal vera ein virkin partur í okkara søluliði, og vera við til at styrkja okkara marknaðarstøðu.

**Um teg:**

Vit ímynda okkum, at tú hevur royndir innan sølu av KT heildarloysnum, ella hevur aðrar royndir innan sølu, men sum minstakrav hevur eina breiða vitan innan almenna kunningartøkni.

Tú hevur møguliga eisini eina grundella kandidatútbúgving innan marknaðarføring, sølu ella líknandi, men hetta er tó ikki eitt krav.

Sum persónur ert tú álítandi, ágrýtin og framfýsin, og hevur evni at seta kundan í miðdepilin, so hann fær røttu ráðgeving í allari tilgongdini, frá fyrsta sambandi og til kundin hevur fingið røttu loysnina.

**Vit bjóða tær:**

Sum kundaráðgevi kemur tú at vera ein partur av okkara Marknaðardeild, sum dagliga samstarvar tætt við allar partar av fyritøkuni.

Tú kanst vænta tær eitt dámligt og óformelt samskifti við tínar samstarvsfelagar og leiðarar, og vit eru øll til reiðar at stuðla tær í tínum arbeiði.

**Løn:**

Lønin verður avtalað nærri í mun til tínar royndir og útbúgving.

**Umsóknir:**

Umsóknir við avriti av møguligum prógvum skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin 24. apríl 2008. Send umsóknina til P/f Elektron, Staravegur 9, Postboks 3219, FO-110 Tórshavn, att: Mikkel Hansen ella við telduposti til mikkel@elektron.fo.

Um tú vilt vita meira um starvið ert tú vælkomin at seta teg í samband við Mikkel Hansen, Projektleiðara, á tel 345 239.

Elektron

P/f Elektron er millum landsins størstu veitarar av KT-tænastum til fíggjarfyritøkur, almennar stovnar og vinnuvirkir. Umframt at menna skipanarloysnir, veita vit tænastur innan infrastruktur og ymiskar hosting-loysnir. 90 fólk starvast hjá P/f Elektron. Visiónin er, at okkara skipanar- og tænastuveitingar hava við sær, at kundin kann fremja framúr avrik á sínum virkisøki, samstundis sum trygdin og rakstrarstøðufestið eru í hásæti.